## Til minnis um verfaðir mín

# Friálv Joensen

**f. 07.09.42 – d. 21.07.02**



*Heystið var vetur er*
*stormur leikar, vindur er.*
*Tó hoyrist ei ond stilli valdar,*
*dagar og nætur vóru taldar.*
*Í myrkri vit saman fella hendur,*
*tí takleys lon eftir stendur*

*Vetur fer mót vári ber,*
*okkurt gott í vænti er.*
*Verður tað nú hesa ferð,*
*at stovmurin hoyrist, og gróður er.*
*Í myrkri vit saman fella hendur,*
*tí takleys lon eftir stendur.*

*Hóast stilli valdar, tá stormur er,*
*búgva vit í hesi verð.*
*Til tann dag mót ljósi ganga,*
*tá skal húsið saman hanga.*
*Í myrkri vit saman fella hendur,*
*tí takleys lon eftir stendur.*

November 2002
**Kári**

## Minningarorð

# Friálvur Joensen

**f. 07.09.42 – d. 21.09.02**



**Til babba**
*So vakran ein dag tú fór frá mær,*
*heyst var í luftini.*
*Tó altíð fløva eg fái frá tær,*
*tú er mær nær.*
*Í hjarta mínum eitt serligt pláss eigur,*
*æru og heiður.*
*Tú er mær nær.*

At skriva um pápa mín er lætt, men tað eg skrivi nú er alt annað enn lætt. Er ikki heilt gingið upp fyri meg, at babba ikki er millum okkum meir. Skilji tað ikki heilt. Tó skulu hesi fáu minningarorð um hann, vera honum til æru.

Stilnað er niðri á Streymneskai. Hvønn dag eg komi heim úr skúlanum, ja so er ongin har niðri. Hyggi av gomlum vana oman á bryggjuna, men har er onki lív. Ongin Norðberg liggur við bryggju, ongin reyður lastbilur uttanfyri mjólkarhúsið, og tað mest óskiljandi… ongin babba. Ein undarligur friður, sum ikki er lættur at góðtaka.

Babba var ein persónur, sum dugdi at savna fólk kring seg, og munnu nógvar góðar løtur verða gingnar júst niðri í mjólkahúsinum á Streymneskai. Har var altíð fólk á vitjan. Nógvar vinmenn átti hann frá útróðrarumhvørvinum, og hesir vitjaðu tíðum í egningarskúrinum. Har munnu nógvir politiskir spurningar verða loystir, og nógvur fiskur fiskaður. Tað var eisini virkuliga stuttligt at síggja babba hava unglingarnar kring seg, tá ið hann stóð og egndi. Hann dugdi at fara við fólki sum fáur. Náttúrugivin evni. Altíð bar til at fáa góð orðaskifti í lag við hann, og tey vóru gevandi. Tað bar til at tosa við hann um alt.

Babba var ein ótrúliga góð fyrimund. Honum lærdi eg nógv av, serliga um lívið. Sjálvt um lagnan ikki altíð var honum so mjúk, so lærdi hann okkum, at lívið var vert at liva, og at vit áttu at verða glað fyri tað.

At sigla var hansara lívsstarv og tað við lít. Longu sum 14 ára gamal fór hann til sjós. Havið var hansara. Fyrsta túr sín til skips fór hann við Saksaberg úr Vági, og hin seinasta túrin við báti sínum Norðberg. Hetta var 21. august í ár. Síðan 1995 róði babba út í egnum báti og ikki kunnu vit siga annað enn, at hann stórtreivst í sínum arbeiði. Um vit upplivdu hann í ringum hýri, so var tað helst tí, at tað ikki viðraði á Norðhavinum, og so slapp hann ikki til útróðrar. Annars var hann glaður fyri sítt arbeiðspláss, sjálvt um havið ikki altíð er vandaleyst.

Ættaður var hann úr Vági. Sonur Oliviu og Edmund Joensen. Traðkaði barnaskógvar sínar niðri á garðabrúgv, og sigldi so sum ungur við skipum, sum høvdu tilknýtið til Vágs.

Já vágbingur var hann við stórum V, sjálvt um vitjanirnar í Vági vóru fáar. Hann gekk íðin til fótbóltsdystirnar hjá VB, sum vóru spældir norðanfjørðs, og hann duldi ikki fyri, hvørjum hann helt við. Varð farið norður á Mølina á Eiði at hyggja eftir EB/Streymi og VB, ja so vistu vit, hvørjum hann helt við. Tí var tað heldur ikki so løgið, at hann heilsaði bygdamonnum sínum eina seinastu ferð í Runavík 11. august í ár. Av hesum áhuga sínum, fekk hann eisini hildið samband sítt við Vág viðlíka.

Av lívinum fekk hann nógv at læra. Misti allar brøður sínar alt ov tíðliga. Skuldi sjálvur gerast tann, ið varð elstur, sjálvt um hann bert náddi at gerast 60 ára gamal. Systrarnar eru nú tríggjar einsamallar eftir, og tykkum sendi eg mína djúpastu samkenslu. Hann átti tykkum, og tit áttu hann. Øll vóru tit glað og góð saman. Niðan til Justu mól babba um hurðina næstan hvønn dag, til Bjarmu støkk hann inn á gólvið, tá ið hann var í Havn, og væl dámdi honum at vitja og serliga fáa vitjan frá Sylviugummu.

Babba var góður fyri okkum øll. Kára tók hann til sín sum sín egna, og tað var virkuliga deiligt at uppliva. Teir báðir høvdu eitt gott og serligt forhold – eins og faðir og sonur. Eri so glað fyri, at babba enn var millum okkum, tá ið eg og Kári giftust. Tað var ein hugnaligur dagur, sum eisini babba var glaður fyri.

Hann og mamma dugdu eisini væl at fjálga um okkum, tá ið vit mistu, so vit bæði vóna, at eisini vit kunnu fjálga um teg góða mamma, sum tit tá fjálgaðu um okkum. Vit hugsa nógv um teg mamma. Tú hevur mist tín elskaða mann. Tit náddu at verða gift í 35 ár, og tað er eitt langt tíðarskeið. Eri so glað fyri, at tit fingu seinastu árini saman í Streymnesi, og at babba var millum okkum í gerandisdegnum.

Marjun átti eitt serligt pláss í hjartanum hjá babba, og eg veit, at henni leingist ótrúliga nógv eftir honum. Hann var nakað serligt fyri hana og hennara. Birita, Annika og Sørin hava mist verðins besta abba. Teimum dámdu so væl at vera hjá abbanum.

Vit hava øll mist, og okkum leingist. Hjørtu okkara eru við at spreingjast av sorg. Babba hvílir nú í tryggari havn, og havið hann siglir í eitur nú Himmalin. Hann hevur nógv, sum hann vitjar har heima. Tó býr hann í okkara hjørtum. Minnini um hann fara vit at goyma og fjálga um í hjørtum okkara, tí nærvera hansara er her. Mín elskaði babba farvæl.

Opb. 21,4 lat hesi orð verða okkum til troyst.

Friður verið við minninum um pápa mín Friálv Joensen.

**Hallbjørg**

# Tórshavnar Kamarkór í konserthýri

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin 1. desember kl. 17.00 hevur Tórshavnar Kamarkór konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Kórið hevur eina sera fjølbroytta skrá sum er myndað av, at jólini skjótt eru í hondum. Sungið verður m.a. á italienskum, enskum og føroyskum máli.

Kórið hevur fingið nýggjan dirigent, nú Hans Pauli Torgarð er uttanlands. Nýggi dirigenturin eitur Leif Hansen og hevur eftirhondini fleiri ár á baki sum kórleiðari.

Við 17 árum á baki, er tannáringatíðin hjá Kamarkórinum skjótt runnin. Hesa tíðina hevur kórið havt skiftandi kórleiðarar. Hetta hevur m.a. borið í sær, at kórið hevur havt ymiskar skráir, alt eftir, hvør kórleiðari hevur verið.

Framførslurnar hava verið á ymsum støðum, og eitt nú í fjør um hesa tíðina framførdi kórið á Gamla Meiaríi eitt áhugavert spanskt verk, sum fekk sera góða undirtøku.

Kórið vónar at síggja nógvir áhoyrarar í "kórbýnum" komandi sunnudag.



# Stovna ST felagsskap í Føroyum

TÍÐINDASKRIV

Í hesum døgum verður farið undir stovnanina av einum føroyskum Sameindu Tjóðum áhugabólki í Føroyum. Fyri at stuðla hesum tiltaki, er ein nýggj heimasíða at finna á alnótini, ið skal lodda dýpið, hvat føroyingar halda um ST og samstundis vera eitt savningarstað, har til ber at finna upplýsingar um ST og arbeiði tess.

Hóast Føroyar enn ikki eru ein sjálvstøðugur limur í ST, so er kortini nógv hjá føroyingum at kjakast um í hesum sambandi. Tí hóast vit ikki eru ein av tjóðunum, ið kunnu atkvøða alment í ST, so eru vit einstaklingar í Føroyum eins nógv ein partur av globala samfelagnum og verða ávirkaði so ella so av tí, ið fyriferst í ST. Vit bæði eiga og kunna vera við til at ávirka ST-samtyktir, antin gjøgnum Danmark ella teir mongu ikki-stjórnar felagsskapirnar (NGO's), ið til eru. Endamálið við einum føroyskum ST felagsskapi, er júst at fáa kjakið um ST á eitt stig, ið elvir til at vit í Føroyum fáa betri innlit í hvat ST er fyri ein stovnur, hvussu stovnurin ávirkar okkum, bæði sum einstaklingar í Føroyum og sum tjóð, og hvussu vit kunnu taka lut í ST-samtyktum og í arbeiðinum hjá ST.

Á heimasíðuni stendur at lesa um hugsjónina aftan fyri stovnanina av hinum føroyska ST felagsskapinum og har er møguleiki hjá fólki at tekna seg sum lim ella bert at fáa upplýsingar um tiltøk o.a., og at atkvøða um ymisk evni, ið eru aktuel viðvíkjandi ST og/ella Føroyum. Vónin er at hava ein fjølbroyttan limaskara; frá folki, ið hava verið við í ST-tiltøkum áður, til lærarar, námsfrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar, heimagangandi foreldur, skúlanæmingar og fiskimenn. Áhugabólkurin er ikki ætlaður bert at vera fyri serfrøðingar, men ein verulig fólkafylking.

Talan er ikki um ein felagsskap undir ST, men eina fólkafylking fyri hugsjónini aftan fyri ST. Í fyrstu atløgu er talan um eina deild av donsku United Nations Association (UNA) (FN Forbundet). Heimasíðan er at finna á: http://unafo.webpuffin.com og annars ber til at fáa fleiri upplýsingar við at senda teldupost til:
a-j@post.olivant.fo

Felagsskapurin fer í fyrstu atløgu at leggja dent á upplýsing til skúlar um ST-hugsjónina og ST-tiltøk og um hvussu einstaklingar kunnu hjálpa til í teimum mongu verkætlanunum hjá ST.

# Evnisdag um Europa



*Lærari og næmingar. Nakrir næmingar við skapandi gávum valdu bólkin, ið nevndist Myndlist. Myndevnini vóru ymisk europeisk fyribrigdi, t.d. sást EU-flaggið, gamlar borgir og kendir bygningar, alt í einum kreativum og litføgrum blandi*

**Næmingar á Miðnámsskúlanum í Suðuroynni byrjaðu hesa vikuna við at seta Europa ovast á breddan**

SKÚLAVIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*

Í Vági stóð Europa ovast á breddanum mánadagin. Tað vóru næmingar á Miðnámsskúlanum, sum byrjaði vikuna við at kunna seg um Europa. Mánadagurin var skipaður sum evnisdagur um Europa, Europadagur, og næmingar valdu so ymsar bólkar at arbeiða í, alt eftir áhuga.

Alskyns viðurskifti viðvíkjandi Europa komu upp at venda, tá næmingarnir og lærarar fóru í gongd. Faktaviðurskifti og hugtøk komu undir lupp. Høvi var at arbeiða bæði bókliga og skapandi.

Næmingar høvdu 10 bólkar ella evni í at velja: Europeiski samleikin, Balladur - vísur, kvæði o.a., Myndlist, Eur. bókmentir (Shakespeare), Náttúruvísund, Søga - politikkur, Matur, Máltíð sum sosialt, mentanarligt og søguligt fyribrigdi, Á ferð í Europa, Fótbóltur og harðskapur.

Um middagsleitið ótu næmingarnir og á matarlepanum var sjálvsagt matur úr Europa, sum næmingar í matbólkinum borðreiddu við. Dagurin eydnaðist væl og endaði við framløgum og framførslum.

†

Kunngjørt verður
at okkara elskaði sonur og beiggi

**Terji Simonsen**

andaðist 27. november 2002, 8 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
leygardagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Maria, Atli og Høgni**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá ið okkara elskaði maður, pápi, verpápi, abbi, sonur og beiggi

**Willy Hansen**

brádliga doyði og varð jarðaður.
Tøkk, øll ið hjálptu til við jarðarferðina og ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og gávur. Takk, tit ið ringdu og tit, ið stukku inn á gólvið.
Tøkk til Ellisheimið, Brynjálv og tey, ið vóru í kapellinum. Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og prest fyri góð orð. Tøkk til øll, ið fylgdu Willa til hansara seinasta hvíldarstað

*Fyri tey avvarðandi*
**Elisa**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sigrun Sølva Vesturskarð**
**Tórshavn**

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á B7. Tøkk til prest, kirkjutænarar, gravarar og sangarar. Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Krabbameinsfelagið og takk til øll tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Óli**
**Jóhannes og Eydna**